## EG MEINI TAÐ

# Eg vil gjalda meira fyri at koyra undir Vestmannasundi



*Niels Uni Dam skrivar:*

Nú eri eg ein sovorðin langhærdur, illavorðin og gjøgnumsúrgaður sosialistur, at tað kanska ofta er ringt at taka meg fyri fult, kanska serliga um tú ert ein konservativur, borgaraligur, høgravendur og hampiligur politikari.

Men eg fari at royna alíkavæl. Hetta vælvitandi um, at flestu konservativu, borgarligu, høgravendu og hampiligu politikarar ikki halda, at umhvørvið er so týdningarmikið, at vit noyðast at gera nakað við dálking. Men sum sagt eg royni alíkavæl.

Tímdi so illa at blanda meg í tunnilskjakið; Marius Dam keðir meg, og legði eg meg út í eitt kjak við hann, hevði hetta kjak óivað kett tykkum lesarar, so eg vildi ikki blanda meg. Men nú havi eg verið í holinum nakrar ferðir. Snotuligt hol, turt og alt, so har er ikki nakað at klaga um.

Fyrstu ferð eg fór ígjøgnum holið var við bussi, hetta kostaði mær 100 kr. hvønn vegin, hetta eru 200 kr. aftur og fram. Seinnu ferðina eg fór gjøgnum holið var tað við bili; vit vóru trý í bilinum, og vit goldu 188 kr. aftur og fram. Tað kostaði mær sostatt minni við bili enn við bussi, ja, sjálvt um vit taka bensin við í roknistykkið, so kann tað næstan betala seg (sum tann langhærdi, illavorðni og gjøgnumsúrgaði sosialisturin eg eri, havi eg ein bil sum brennur lítið). Fóru vit øll trý við bussi, hevði hetta kostað 600 kr. aftur og fram.

Eg spurdi meg sjálvan, hvussu kann hetta bera til? Kring allan heimin (kanska USA undir George W. undantikið), síggja fólk dálking sum ein tann størsta trupulleikan fyri mannaættina. Ja, sjálvt formaður javnaðarfloksins segði nýliga, at dálking var ein tann størsti trupulleikin í framtíðini, so tað er ikki nøkur hemmiligheit. Men hóast hetta velur ein frá almennari síðu, at gera gjaldið fyri at koyra gjøgnum ein almennan tunnil við privatbili nógv lægri enn við almennum ferðasambandi.

Eg veit, at her er talan um almenn partafeløg, men hetta eru feløg sum vit borgarar eiga, og tí mugu tey eisini virka til okkara frama og ikki okkara undirgang. Hví tramin kunnu vit ikki seta prísin fyri persónbilar hægri, kanska einar 300-400 kr. aftur og fram, og brúka hesa meirinntøku til at fíggja eina bíligari busskoyring.

Nógv varð kjakast um, at um prísurin var ov høgur, so fóru fólk at lata bilin standa, og hetta fór at ganga útyvir fíggingina av tunnilinum. Men hvat so? Tað skuldi jú bara verið gott um fólk tóku bussin ístaðin. Um trupulleikar standast av at hetta eru tvey almenn partafeløg, kunnu vit bara leggja tey saman. Hetta eru jú partafeløg sum hava sama eigara.

**Vikuskifti**

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820,
telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



*Tann gamla og so væl kenda trappan upp til Hotel Føroyar og Tryggingarsambandið, er nú í orðsins rætta týdningin morlað sundur – við stórum maskinum og dynamitti. Her skal nýggja móttøka tryggingarfelagsins nú hýsast…*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Móttøkan verður undir trappuni

### Gamla trappan hjá Hotel Føroyum og Tryggingarsambandinum Føroyar er nú morlað sundur. Har verða stásilig móttøkuhøli nú bygd

**TRYGGING**
*Eirikur Lindenskov*

Í mong ár hevur Tryggingarsambandið Føroyar, seinni Tryggingarfelagið Føroyar, bygt um í gomlu bygningunum á Kongabrúnni. Umframt bygningarnar, sum Tryggingin hevur húsast í síðani 1959, er Geilin, ella Gjaldsstovan, bygd av nýggjum og tikin í nýtslu sum skrivstovuhøli og móttøka hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Men tað er ikki ætlanin, at móttøkan skal verða verandi í Geilini, hon skal eisini gerast av nýggjum – har sum trappan var upp til gomlu móttøkuna. Tann so væl kenda gamla trappan til gamla Hotel Føroyar er nú í orðsins rætta týdningi morlað sundur – við stórum maskinum og við dynamitti.

Har, ið trappan varð, verða nýggj, snotulig høli gjørd, ið skulu hýsa móttøku tryggingarfelagsins – og tá øll umbyggingin einaferð verður liðug, skulu bygningarnir á Kongabrunni hýsa øllum virksemi tryggingarfelagsins í høvuðsstaðnum.

Tá ið Tryggingarsambandið fór undir virki sítt 1. juli í 1940, helt felagið til í Kristnastovu í Gongini, og har var Tryggingarsambandið til 1. mai í 1947. Tá varð skrivstovan flutt til hús við kongabrúnna, nevnd »Rosenborg«, sum nú er partur av stóra bygninginum – tann parturin, sum er sunnan fyri trappuna.

Árið eftir, neyvari tann 1. apríl í 1948, flutti Tryggingarsambandið út í ognina í Tinganesi, Skansapakkhúsið, sum tað hevði keypt frá A/S Charles Mauritzen & Co. Har vóru skrivstovurnar, til flutt varð í húsini á Kongabrúnni tann 15. august í 1959.

Stórar broytingar vórðu farnar fram á Kongabrúnni hesi árini, meðan Tryggingarsambandið helt til úti í Tinganesi. Í árunum 1948-50 var hotellið bygt saman við Evensens húsum. Eisini vórðu aðrar ognir keyptar, t. d. Portugálið, ein hjallur og neystið hjá Nótafelagnum (Nótaneystið).

Í 1950 brann allur hotellbygningurin (Evensens hús við tí nýggja tilbygninginum) í grund. Eldurin var ásettur. So var eisini við Vektabúðin og Sjóbúðini í Tinganesi um somu tíð. Tað var eftir nýbyggingina av hotellinum og skrivstovubygninginum, at flutt varð úr Tinganesi.

Løgtingið keypti í 1957 ognina í Tinganesi til ta nýggju landsfyrisitingina, sum byggjast skuldi upp við heimastýrisskipanini.



*Bygningarnir á Kongabrúnni. Uttast til vinstru sæst bygningurin hjá Niels L. Arge, aftanfyri síggjast bygningarnir hjá Hotel Føroyum og uttast til vinstru Rosenborg, ið eins og bygningurin hjá Niels Arge nú er partur av stóra bygninginum hjá Tryggingarfelagnum Føroyar. Myndin er tikin áðrenn eldsbrunan 1. juni í 1950*

*Mynd: »Trygging í Føroyum«*



# Eg átti mær ein grønan bil …



*Ása undir Kletti*
auk@post.olivant.fo

Eg havi sæð ljósið. Jú. Eg lúgvi ikki. Eg havi sett grøna bil. Tími ikki longur alt hatta stríðið við at leita eftir parkeringsplássi, sum ongantíð er har, tá mær tørvar tað. Tími ikki longur at standa í kilometurlangari bíðirøð við ljóskurvarnar. Tími ikki longur at standa við vegamót og noyðast at fara til høgru, sjálvt um eg skuldi til vinstru, tí eingin bilur av teimum fleiri hundrað, sum koyra framvið, hugsar um meg og mínar pínslufelagar í okkara Nissan, Toyota, Fiat, Mazda og onkrum hissini Biiii Emmm Dobbeljúúú, sum standa so forfjónaðir og skikkiligir saman við mær í røðini og bíða og bíða. Tími ikki at skava kavan burtur av rútunum um morgnarnar. Tími heldur ikki at hugsa um at skifta dekk, tá tey skulu skiftast. Og ikki um at tala, tá grøni liturin gerst gruggut-brúnligur og "dýrið" skal vaskast.

Tími so yvirhøvur ikki at gjalda vegskatt, bensin, kølaravesku (haldi eg, at tað eitur) og alt hitt, tit vita, sum hevur við bilin at gera. Nei. Nú er liðugt. Ikki fyri tað. Eg skal ikki gera meg betri enn eg eri. Fari eg í svimjihylin ein leygarmorgun við morgunhári og øðrum góðum, koyri eg. Minni mest um fjørutrøllið hjá Zakaris, so tá er best at brúka grøna bil. Tað man vera tað tryggasta. Fyri hini! Vil ikki geva nøkrum bilførara sín lívs skelk í dimmalættingini. Tað hevði verið øgiligt, um onkur lá eftirá vegna mítt sjáldsama morgunlook.

Taki so hjartaliga synd í foreldrunum sum, um morgnarnar, noyðast at koyra børnini í vøggustovu, barnagarð og skúla, nú ferðslan er økt so heilt øgiligt seinnu árini. Børnini ótolnast, babba gerst strongdur, og mamma situr samanbitin og ynskir allar hinar bilarnar niður og norð. Keðilig byrjan á degnum.

Um vit "hálvgomlu", sum ikki hava børn at koyra um morgnarnar, settu bilin ein dag um vikuna, var betri pláss á vegunum, færri fingu strongd, fleiri fingu ein heilsugóðan gongutúr, vit spardu pening, skatturin hevði minkað, tí heilsuverkið fær minni at gera, og eitt veldugt pluss afturat: Vit høvdu dálkað minni, og tað hevði frøtt okkum og Eyðun. Ein ordans domino-effekt av tí positiva slagnum. Og tað er gott, vildi eg mett. Og ímynda tær fongin bæði so og so, um vit gjørdu hetta tvær ferðir um vikuna.

Frá Bileftirlitinum frættist, at í Tórshavnar Kommunu eru 9.039 akfør, sum trilla javnt og samt kring býin. Her er alt frá prutlum til bussar. Av hesum eru 6.603 persónbilar. Ei undur í, at tað er trongligt. Giti, at í minsta lagi 5.000 bilar koyra í havnargøtum millum 8 og 9 á morgni. Fimmtúsund bilar, sum standa við ljóskurvar og vegamót og bíða; bilar, sum kosta uml. 120.000 kr. í meðal, sum tilsamans kosta **EINA HÁLVA MILLIARD PLUSS HUNDRAÐ MILLIÓNIR,** 600.000.000 kr. (her eru so nógv null, at eg mátti hava hjálp at telja tey). Og allir standa teir hvønn dag so fittir og tolnir, bilarnir, onkrir smædnari enn aðrir, uttanfyri arbeiðsplássini og á parkeringsøkjum í einum ordans fríluftsbanka, sum ongar rentur gevur, heldur tvørturímóti. Hetta er vælferðarsamfelag við lít....ella? At vit tíma.

Eg eri eisini ein vánaligur bilførari. Tími so øgiliga illa at konsentrera meg um júst tað at koyra og fari krúpandi avstað við 40 km. um tíman. Tankarnir eru alla aðrastaðni enn á vegnum. Skimist higar og hagar. Tað gav at bíta, tá eg og ein vinkona fóru ein túr norðureftir. Vit høvdu gjørt okkum út við alskyns góðum til matna — ætlaðu at sessast við onkran áarløk, njóta Guds fríu náttúru, tølandi tutlið frá løkinum og fáa okkum ein góðan bita. Áðrenn eg visti av, var hon í ferð við at borðreiða við "útfluktsmatinum" á baksetrinum, tí sum hon segði: Við hetta lag verður myrkt, áðrenn vit koma vegin fram, so eg geri klárt á baksetrinum."

Og hvussu komi eg so vegin fram, spyrt tú? Jú. Eg gangi. Tú las rætt. Eg haldi endorfinuhoff tvær ferðir um dagin. Eg gerist "høg" av berum endorfinutreffi, so høg, at eg gloymi, at eg bara eri neyðars 167 cm. Deilig kensla og so er hon lóglig og ókeypis. Eg gangi til arbeiðis, og eg gangi enntá ein umveg heimaftur. Býttislig, ha?

Eg gangi út at vitja mammu, og eg gangi, tá eg skal onkrastaðni um kvøldarnar. Tað er deiligt at ganga og einki trongt! Gott tað sama kanska, tí var trongsul á gongubreytunum høvdu okkara kæru býráðslimir verið skjótir og kravt fortovsskatt.

Hitti ikki nógv á gongubreytini. Og tó. Onkrir "gongubreytarglottar" eru. Óla, mín kæra floksfelaga frá barnaárunum, hitti eg javnt og samt úti við Strond, tá eg gangi mín túr til arbeiðis. Hugsi, at eisini hann gongur fyri lívinum, og so man hann hava so nógv at hugsa um eisini. Formaður í fíggjarnevndini og alt hattar har, tit vita.

Og so er tað Myrna. Hon er sum eitt fok. Gongur so støðugt sum stemplið í mjólkarbátinum Sigmundi, tá hann á sinni fór duffandi inn á Toftir. Hana hitti eg eisini onkuntíð, tá hon strýkur framvið við sjey míla ferð, so eg næstan ikki nái at síggja, at tað er hon. Myrna er eisini føst og fús í svimjingarhylinum, tó ikki við sama hársniði sum eg.

Hvat geri eg so, tá kavafannirnar liggja meturhøgar og Jan og tey bara síggja til, at vegirnir verða ruddaðir og gloyma okkum dylhøvd, sum gera nakað so púra ørligt sum at ganga, tí vit í roynd og veru elska at ganga? Jú. Eg havi funnið útav at brúka skølingar! Ja. Flenn tú bara. Teir gomlu vistu, hvat teir gjørdu, tá teir brúktu skølingar í hálu fjøruni og í bjørgunum. Smoyggi teir uttan yvir kondiskógvarnar, so tey fáu, sum síggja meg, hugsa, at nú hevur hon mestur verið og keypt sær einar nýggjar, ljósamorreyðar Nike hjá Thomas Dam. "Sollin" er enntá stiklabundin, so nú kann einki halda mær aftur. Hetta er genialt. Og so eri eg so deiliga fjálg um føturnar. Kanska ikki so elegant og yndislig, men hvat leggi eg í tað.

Tað er eisini nokkso kul at fara frá húsum um morgnarnar og spola fram við øllum stakkaladýrunum, sum standa og frysta, meðan tey skava kava av bilrútunum, meðan motorurin gongur í tómgongd! Tá tey hava skavað seg liðug, eri eg komin hálva leið. Og eg skal ikki skavast, gangi ongantíð í tómgongd, skal bara onkuntíð til eftirlit, skal ikki skifta dekk og missi ikki virði. Og.........so havi eg powerstýring. Stórt.

Ein av mínum kæru starvsfeløgum bar ótta fyri, at jólavætturin, sum var í SvF, hevði gloymt skølingarnar eftir á radiatorinum inni á vesinum. Eg skundaði mær at sissa hana og fortelja, at eg átti teir. Eyguni gjørdust sum tekoppar. "Tú?" Nú bar av. "Nú er hon gingin av vitinum," mutlaði hon fyri seg sjálva og rysti uppgevandi við høvdinum. "Gongur í skølingum. Hevur nakað hoyrt so skapt."

Kanska hevði tað verið eitt hugskot hjá Tórshavnar kommunu at flýggja út skølingar, tá kavin legst. So fáa vit runnar um summarið og skølingar um veturin. Ja. Ja. Hetta var bert eitt hugskot.

Men . . . eg má viðganga, at eg ikki brúki teir á veg heimaftur seinnapartar, nú dagarnir leingjast.. Tá er ljóst, og hóast alt eri eg eitt sindur forfeingilig. Rætt skal vera rætt. Tá eitur tað Adidas, so tað munar. Ná. Eg eri farin. Geri sum Dúgvan onkuntíð ger um Leirvíksfjørð. Fari eykatúr. Vit síggjast!

